

*Tað var so nógvur vindur í Runavík fríggjamorgunin, at línuskipið Hoyvíkingur sleit og rak fastur á einum flúri. Stutt eftir middag eydnaðist tað sleiparum hjá skipasmiðjuni MEST at fáa skipið leyst aftur. Tá hevði kavari verið niðri og hevði staðfest, hvussu best var at hála skipið av aftur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sleit og rak á land

**Í nógva vindinum seinasta fríggjamorgun sleit línuskipið Hoyvíkingur, meðan hann lá við bryggju í Runavík – og rak á ein flúr beint út fyri bygninginum hjá timburhandlinum Borg**

Vilmund Jacobsen

Tað sá ikki so trupult út at fáa skipið leyst av aftur, tá Sosialurin vitjaði í Runavík fríggjamorgunin. Kortini skuldi tað vísa seg, at skipið kom at standa á flúrinum til beint eftir middag, tá kavari hevði verið niðri, og sleipibátarnir hjá MEST tá betri vistu, hvønn veg teir skuldu hála skipið av aftur.

Sunleiv Højgaard, brunaumsjónarmaður hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, sigur, at hóast royndir vórðu gjørdar fyrr um morgunin at hála skipið av aftur, vísti tað seg, at fleiri flúrar eru, har skipið stóð. Tá Hoyvíkingur vísti seg at loysna, gjørdist hann fastur aftur.

– Men tá ein steðgur hevði verið í royndini at fáa skipið av aftur, samstundis sum kavari var niðri og kannaði umstøðurnar, gekk bæði skjótt og væl.

Og klokkan 12.25 var Hoyvíkingur leysur aftur.

Sunleiv Højgaard sigur, at hol kom ikki á skipið, og einki bendi á, at skrokkurin hevði fingið stórvegis skaða.

– Trupult er at siga heilt ítøkiliga, um alt er óskalað, men líkt er ikki til, at skrokkur, skrúva og róður hava fingið nevniverdar skaðar, segði Sunleiv Højgaard, brunaumsjónarmaður, tá Sosialurin tosaði við hann eftir, at Hoyvíkingur aftur lá tryggur við bryggju í Runavík.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Vænta stórt prísfall

**– Nú alivinnan í Chili er á veg uppaftur úr aldudalinum, vænti eg ikki, at vit fara at síggja somu marknaðarprísir á feskum laksi næsta ár, sum vit hava sæð í ár**

Vilmund Jacobsen



Tað gongur betur í chilensku alivinnuni aftur, eftir at alivinnan í landinum hevur verið so álvarsliga herjað av fiskasjúkum seinnu árini.

Støðan í Chili hevur ført til, at marknaðurin í USA hevur keypt nógvan evropeiskan laks fyri góðar prísir, og tað er serliga tann stóri laksurin, sum hevur verið eftirspurdur í USA.

Men nú er gongd aftur í chilensku alivinnuni.

Ragnar Joensen, stjóri í Marine Harvest í Føroyum, væntar, at laksavinnan her um okkara leiðir fer at merkja kappingina úr Chili av álvara í øðrum fjórðingsári í 2011.

– Eg vænti, at marknaðarprísirnir fara at lække so hvørt, sum Chili veksur um sína framleiðslu. Alivinnan í Chili fer at gera tað trengri hjá øðrum laksi á amerikanska marknaðinum, og eitt nú noyðast lond, sum í dag hava stóra sølu í USA, tá at senda størri nøgdir á evropeiska marknaðin.

Hann sigur, at tað eru teir, sum vænta, at marknaðurin fer at veksa nokso fitt, soleiðis at afturgongdin í prísi kanska ikki verður so stór kortini.

– Við sushi og øðrum nýggjum laksavørum veksur marknaðurin. Eingin ivi er um tað, men eg vænti, at vit koma at síggja heilt aðrar prísir so hvørt, sum árið 2011 fer at líða, sigur stjórin í Marine Harvest í Føroyum.

Ragnar Joensen er eisini næstformaður í Føroya Havbúnaðarfelag.

Árið í ár hevur verið sera gott hjá føroyskum alifeløgum, og eitt nú fer Marine Harvest Føroyar helst at koma við einum avlopi - fyri skatt – upp á einar 60 miljónir krónur.

*vilmund@sosialurin.fo*


LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

## Løgfrøðingur til Løgtingsins umboðsmann

**Eitt starv sum løgfrøðingur hjá Løgtingsins umboðsmanni er leyst at søkja frá 1. januar 2011 ella eftir avtalu.**

**Embætið**
Umboðsmaðurin, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000, fór undir virksemi sítt 1. mai 2001. Uppgávan hjá umboðsmanninum er at hava eftirlit við almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, herundir at viðgera klagur frá borgarunum um avgerðir v.m. Á skrivstovuni starvast dagliga umframt umboðsmannin, tveir løgfrøðiligir ráðgevar og ein skrivstovufulltrúi.

**Uppgávurnar**
Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:
- fyrireiking og viðgerð av innkomnum klagum
- uppgávur í sambandi við eftirlitskanningar av málsviðgerðini á útvaldum økjum, og
- kunningarvirksemi um fyrisitingarlig evni og um virksemið hjá umboðsmanninum.

**Setanartreytir**
Tann, sum settur verður, skal hava prógv sum løgfrøðingur. Stórur dentur verður harumframt lagdur á royndir eftir lokna útbúgving, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan almennu fyrisitingina.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Møguleiki er fyri setan sum ráðgevi II, um førleikin og royndirnar eru til tess. Tann, sum settur verður, má tola møguligar broytingar í arbeiðsuppgávunum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu verða umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. desember. Adressan er:

**Løgtingsins umboðsmaður**
Traðagøtu 43
Postsmoga 2008
165 Argir

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólju í Ólavsstovu, umboðsmann á tlf. 358500/218691.